# Nýggjur sáttmáli undirskrivaður

### Neyðugt verður kortini ikki hjá nýggju Norrønu at sigla undir fremmanda flaggi

SEMJA
*Heri á Rógvi*

Reiðarafelagið fyri Farmaskip og Føroya Skipara- og Navigatørfelag komu týsdagin ásamt um nýggjan 1 ára sáttmála.

Semingstovnurin kallaði partarnar saman týsmorgunin og týsdagin, og tað eydnaðist at fáa partarnar at semjast.

Talan er um ein 1 ára sáttmála galdandi frá 1. mars 2003 til 1. mars 2004.

Sáttmálin ber við sær, at talið av frídøgum verður økt frá 28 til 30. Hetta merkir, at fyri hvørja tretivu dagar umborð, so fær ein tretivu dagar frí.

Hetta svarar til sáttmálarnar við hini manningarfeløgini, sum gjørdu 2 ára sáttmála galdandi frá 1. mars 2002. Broytingin svarar til eina hækking uppá 3,45%, sigur Vinnuhúsið í tíðindaskrivi.

Partarnir samdust eisini um at seta arbeiðstíðini upp frá 10 til 11 tímar um samdøgrið, og lønin verður hækka tilsvarandi tímatalinum.

Skipara- og Navigatørfelagið vildi hava arbeiðstíðina upp til 12 tímar, men hetta vildi Reiðarafelagið ikki ganga við til.

Nú nýggja Norrøna skal inn í flotan var lønartalvan víðka, so hon eisini umfatar skip við hesari stødd. Hetta merkir, at tann best lønti eftir sáttmálanum er skiparin umborð á Norrønu.

Sáttmálin umfatar á leið tíggju skip og eini 300 fólk, metir Árni Joensen, formaður fyri Reiðarafelagið fyri Farmaskip.

Reiðararnir hava í fjølmiðlunum tosað um møguleikan at fáa skipini hjá sær undir fremmant flagg, men hetta verður eftir øllum at døma ikki neyðugt.

### Nøgdur

Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara- og Navigatørfelagnum, sigur, at hann er væl nøgdu við nýggja sáttmálan.

– Vit høvdu ynskt at fingið meira, men vit eru nøgdir við hetta, sigur Ellintur Abrahamsen.

Hann heldur, at útfrá semjuni var verkfallið mestsum óneyðugt, tí teir høvdu sagt ja til hesa semjuna beinanvegin, um so var.

– Vit burdu verið slopnir undan verkfallinum, men hetta var tað, sum skuldi til fyri at fáa reiðararnar at skilja, at vit meintu tað í álvara, sigur Ellintur Abrahamsen.

### Órealistiskt

Meðan Ellintur Abrahamsen heldur, at sloppið kundi verið undan verkfallinum, so situr Àrni Joensen, formaður fyri Reiðarafelagið fyri Farmaskip, ikki við somu kenslu.

– Krøvini hjá teimum vóru heilt órealistisk at byrja, so eg dugi illa at síggja, hvussu vit kundu verið slopnir undan verkfallinum, sigur Árni Joensen.

Og formaðurin fyri reiðararnar er heldur ikki heilt nøgdur framvegis.

– Eg meti framvegis, at hetta er eitt sindur langt úti, men vit verða noyddir at liva við hesum, sigur Árni Joensen.



*Formaðurin í Skipara- og Navigatørfelagnum heldur, at sloppið kundi verið undan verkfallinum.*
*Mynd: Àlvur Haraldsen*



*– Vit verða noyddir at liva við hesum, sigur Àrni Joensen, formaður fyri Reiðarafelagið fyri Farmaskip*



## Tøkk

Ein hjartans tøkk til tykkum,
sum á ymiskan hátt vóru við
til at gera mín 80 ára føðingardag,
so hugnaligan og ógloymandi.

Tøkk til allar hjálpandi hendur.
Tøkk til Leif Sørensen, sum
fyrimyndarliga stóð fyri matinum.

Tøkk øll somul.

**Poul Johs. Johansen**

# Kaupthing

### 2002 eitt ár við stórum avbjóðingum

TÍÐINDASKRIV

At 2002 fór at vera eitt ár við enn størri avbjóðingum á virðisbrævamarknaðinum enn 200 og 22001 var við ársbyrjan ikki væntandi.

Úrslitið á 72 tkr. er, um sæð verður burtur frá umstøðunum ikki nøktandi, men um sera vánaligu marknaðarviðurskiftini verða tikin við í myndina, kann úrslitið hóast alt metast vera nøktandi. Inntøkurnar í samband við ognarrøkt eru falnar, men vinnutænastur og virðisbrævahandil í ávísan mun hava útjavnað lækkandi inntøkurnar frá ognarrøktini. Harumframt er útslitið eisini merkt av einum kurstapi á 420 tkr.

Úrslitið av fíggjarpostum gjørdist 9.313 tkr., meðan samlaðu útreiðslur felagsins annars vóru 9.241 tkr. Fíggjarstøðan javnvigar við 12.359 tkr. Eginognin var við ársenda 2002 11.431 tkr. Og solvensurin var 142,3 í mun til minstakravið á 8%.

Vánaligu viðurskiftini á virðisbrævamarknaðunum í 2002 gjørdu umstøðurnar í sambandi við virðisbrævahandil sera truplar. Fallandi partabrævamarknaðir gjørdu at íleggjarar sum heild fluttu frá partabrøvum til lánsbrøv ella til innlán. Fyri Kaupthing Føroyar øktist røktin av lánsbørvum í árinum, meðan røktin av partabrøvum minkaði men samanumtikið umsitir felagið umleið somu upphædd fyri viðskiftafólk, sum við ársenda 2001 – t.e. umleið 1,1 mia.

Í farna árinum fór Kaupthing Føroyar veruliga at bjóða fram vinnutænastur, ella corporate finance tænastur, sum hetta eisini verður kallað. Móttøkan hevur verið góð og Kaupthing Føroyar hevur í árinum fyriskipað kapitalhækkingar fyri føroysk feløg og hevur verið ráðgevi í samband við størri ný- og umfíggingar hjá føroyskum fyritøkum. Eitt av tiltøkunum í hesum sambandi var at taka stig til at seta á stovn fyrsta privata framtaksfelagið í Føroyum – Notio Framtaksfelag P/F


## Móttøka



1. apríl hevur Torbjørn Mikkelsen, stjóri á Toll- og Skattstovuni, 60 ára størvsdag.

Móttøka verður á Parnassinum á Hotel Hafnia týsdagin 1. apríl frá kl. 15.00 - 18.00

Øll eru vælkomin

Toll- og Skattstova Føroya


†

Tað verður kunngjørt at kæra kona, mamma, systir
og omma okkara

**Vilgerð Astridardóttir**
Tórshavn

andaðist týsdagin 25. mars 63 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju
leygardagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*

**Andrias og Manijeh**

Tey, ið vilja minnast Vilgerð, kunnu lata eina gávu til Spedalskheitsmissiónina,
konto í Føroya Sparikassi.

Nr. 60 - 27. mars 2003
Sosialurin


# Áttatiárini í Sørvági

### Leygarkvøldið verður stórt dansitiltak við 80' ara bólkum í Sørvági. Seks bólkar fara at luttaka. Skipað veðru fyri bussrútum úr Fuglafirði, av Toftum og úr Havn í samband við tiltakið

DANSUR
*Edvard Joensen*



*Jóan Jakku Guttesen, her á palli saman við Sámali Ravnssfjall, verður við í bólkinum Tinganest, sum fer at spæla til dans í Sørvági leygarkvøldið*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Sørvági:** Sørvingar bjóða í dans leygarkvøldið. Seks ymiskir bólkar, sum vóru virknir í áttatiárunum, fara at spæla, og skipað er fyri bussferðum til og frá dansinum. Tað er stuðulsfelagið hjá SÍ, sum skipar fyri tiltakinum. Tiltakið byrjar á miðnátt leygarkvøldið, og Marjun í Kálvalíð úr Miðvági verður frásøgufólk, sigur stuðulsfelagið hjá SÍ í tíðindaskrivi.

Skipað verður fyri ferðasambandi til Sørvágs. Bussar koyra úr Fuglafirði, av Tofum og úr Havn, og steðgað verður á vanligum støðum á vegnum.

Úr Fuglafirði fer bussur klokkan 23.30. Hann koyrir út á Toftir, áðrenn farið verður vestur i Vágar. Koyrt verður av Toftum umleið klokkan 24.00. Kostnaðurin fyr flutning úr Eysturoynni aftur og fram er settur til 100,- krónur. Tað ber til at ringja til bussin á tlf. nr. 21 21 21.

Eisini úr Havn koyrir bussur í samband við dansin í Sørvági leygarkvøldið. Hann koyrir frá City klokkan hálvgum eitt, og er kostnaðurin við tí bussinum kr. 160,- aftur og fram. Tann bussurin hevur tlf. nr. 21 77 53.

Bussarnir koyra úr aftur Sørvági klokkan 04.15 sunnumorgunin, og teir steðga eisini á heimvegnum á teimum vanligu støðunum, siga sørvingarnir í tíðindaskrivinum.

Teir seks bólkarnir, sum fara at spæla til dans í Sørvági leygarkvøldið, eru: Tinganest, Tarok, Ghost Riders, Nautilus, Arival og Jóanes & Co.


HeimaGreiðslan




**Við HeimaGreiðsluni kanst tú:** Kanna saldur · Fáa yvirlit yvir bókingar · Rinda rokningar og flyta pengar · Samskifta við kundaráðgevan · Søkja um lán

Við fartelefon, teldu og internetsambandi kanst tú vera kring allan heim og greiða tíni sparikassaærindi tá best liggur fyri.

HeimaGreiðslan er ókeypis.

Vitja heimasíðuna www.sparikassin.fo og royn HeimaGreiðsluna.

Tú gert av hvar og nær. Við HeimaGreiðsluni
er Sparikassin opin – har og tá tú ynskir tað.

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo